

ristist, tá Jens leggur armin um hana. Og við gráturødd sigur hon:

"Hetta er ræðuligt!"

Bróðurin troystar hana, og hon kennir seg trygga.

Løtu seinni, tá Maria er vorðin meria rólig, koyra tey víðari ímóti lítlu bygdini, har bróðurin hjá Jensi og Mariu býr. Tey eru sein, og føðingardagurin er farin í gongd. Tey tosa ikki um tað, sum hent er, tí neyðut er at verja børnini, og Maria vil at góða lagið á fólki skal halda fram. Hon heldur seg tí fyri seg sjálva.

## Deyðatøgn

Tankarnir flúgva sum hvirluvindar runt í høvdinum á Mariu. Hon er um at bresta. Nú veit hon, at hon ikki skal heim aftur.

Hon hevur gjørt av, at hon fer við mammuni og synunum í bili til Havnar seinni um kvøldið. Men áðrenn tey fara ringir hon til Kim og sigur, at tey gista hjá bróðrinum.

Komin til Havnar fara Maria og mamman beina leið í tað arbeiðshølið, sum Kim og Maria plaga at vaska um kvøldið. Heima í húsunum hjá foreldrunum hjá Mariu eru dreingirnir farnir til songar.

Maria er í døpurhuga. Hon læsir hurðina; hon hevur logið fyri Kim og óttast tí, hvat kann henda. Í rúminum er deyðatøgn. Einasta ljóðið, ið órógvar tøgnina eru strokini frá skrubbuni, hvørja ferð hon snarliga fer aftur og fram eftir gólvinum.

Fjáltur er á mammu og dóttur, sum vaska so skjótt sum til ber. Men brádliga verða tær órógvaðar av, at onkur bankar.

"Kanska tað er Kim," teskar mamma Mariu.

Men skjótt síggja tær, at tað er Lisa. Hon stendur uttan fyri glashurðina og vinkar. Maria hevur tosað við hana fyrr um kvøldið og greitt henni frá, at tey ikki skulu sova heima í nátt, og tí er Lisa komin.

Tá tær í náttarmyrkinum endiliga kunnu leggja leiðina heim til foreldrini hjá Mariu, er Maria troytt og kedd. Men enn ein lagnutungur dagur er henni fyri framman, tá hon leggur seg undir dýnuna á miðjari nátt.

## Dreymurin syndrast

Maria vaknar tíðliga næsta morgun. Hon er útlúgvað av øllum, sum hendi í gjár, men hon hevur ikki stundir at blíva liggjandi í songini.

Hon veit, at hon fer frá Kim. Men ikki fyrr enn um middagsleitið aftaná hon hevur tosað við leiðarin í Kvinnuhúsinum, kennir hon seg heilt klára at fara. Tá tekur hon endaligu avgerðina.

Fyri fyrstu ferð er tað ikki hjúnalagið og tann fullkomna familjan, ið kasta skuggar yvir alt annað. Nú ynskir hon at bjarga tí partinum av familjuni, ið hon ikki kann vera fyri uttan. Børnini.

Eftir prátið í Kvinnuhúsinum fer hon beina leið framvið Ríkisumboðsskrivstovuni, har hon biðjur um hjúnaskilnað. Ímeðan bíðar Lisa saman við brøðum sínum í Kvinnuhúsinum, teir spæla Playstation og hugna sær ófført.

Maria er kensluleys. Hon kundi eins væl verði ein maskina, sum var sett til at gera ávísar uppgávur. Hon skrivar undir hjúnaskilnaðpappírini uttan at hugsa stórvegis um tað. Men hon hevur gjørt av, at tað er tað skilabesta at gera.

Á veg aftur í Kvinnuhúsið hittir hon vinkonuna, Ruth, ið hevur verið hjá skósmiði. Áðrenn Maria nær at hugsa seg um, hevur hon fortalt vinkonuni, at hon flytir frá Kim og ætlar til Danmarkar at vera í eina tíð. Hon vil burtur frá lítla samfelagnum, har søgan hjá Lisu longu gongur sum slatur.

Mariu tørvar hjálp til at flyta nøkur ting úr húsinum, men tíðin er knøpp, tí skjótt fær Kim frí, og tí spyr Maria vinkonuna um hjálp.

Áðrenn tær koyra til húsini, fara tær eftir Lisu í Kvinnuhúsinum.

## Pakka og fara

Tíðin rennur avstað, men Maria veit júst, hvat tey skulu hava við. Hon biður Ruth pakka Lego og onnur ting hjá dreingunum, meðan Lisa pakkar síni egnu ting.

Fyri at tað skal ganga so skjótt sum gjørligt, hevur Maria ringt eftir bróður sínum Jensi, sum nú er á veg. Tá hann fáar minuttir seinni kemur, hjálpir hann Ruth at pakka leikur hjá dreingunum.

Maria er fokuserað. Hon syrgir fyri at dópsbrøvini og passini verða løgd í taskuna. Síðan fer hon inn í vaskikjallarin, har hon pakkar síni egnu klæðir og tey hjá synunum í svartar skrelliposar.

Tað gongur skjótt.

Hon óttast, at Kim nær at koma heim, áðrenn tey eru liðug, tí hann fær skjótt frí frá arbeiði.